gult32 cyan32 magenta32 svart32



# FRIMÆRKER OG MØNTER SØGES!

**Gratis vurdering i Thorshavn.**




**Fredag den 8. juni kl. 16-20 afholdes vurderingsdag på Hotel Føroyar, Thorshavn.**

Til vore kommende auktioner søges gl. breve til og fra Færøerne, gl. postkort, fragtbreve og alle former for frimærkesamlinger, samt mønter, medaljer, pengesedler og øvrige gamle betalingsmidler. Medbring Deres samlinger til en gratis og uforpligtet vurdering.

**Lørdag den 9. juni** vil der ligeledes være mulighed for vurdering i Deres hjem efter forudgående aftale.
Kontakt os evt. allerede nu for en uforpligtende samtale.

**Tlf. 0045 86 11 47 11**

**CRAFOORD**
**NELLEMANN & THOMSEN**
AUKTIONSHUS SIDEN 1869
Skanderborgvej 104-106 · DK-8260 Viby/Århus · Danmark

# Ólavsøkan 2001

## Viðvíkjandi sølu og tiltøkum



Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað, ið fæst í Snarskivuni.

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til:

**Hósdagin 14. Juni 2001, kl. 12.00**

Umsóknir, sum koma inn aftaná 14. juni 2001, kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.

*Tórshavnar kommuna*



# Fólk søkist til Bakaríið hjá Símun

Vit sóknast eftir hjálparfólki til bakaríið at byrja skjótast gjørligt.

# Lærlingur til Bakaríið

Hevur tú hug til at arbeiða á spennandi fjølbroytt-um arbeiðsplássi, so hava vit eitt læruplás til tín.

**Bakaríið**
hjá **Símun**

Tlf. 456424 ella 455032
box 299
700 Klaksvík

**Eykasýningar av ungdómssjónleikinum**

# Speedy Gonzales setur ferð á

sum næmingar hjá Dramaverkstaðinum og Kvøld og Ungdómsskúlanum framføra á Meiarínum í Havn.

**Sunnudagin 3. juni kl 16:00**
**Mánadagin 4. juni kl 16:00**
Atgongumerkir fáast í Kunningarstovuni og 1 tíma undan sýning á Meiarínum.

**Dramaverkstaðið**
við Hjørdis Johansen
Korkagøta 12
FO-100 Tórshavn
Faroe Island
Tlf: 31 60 28
Http://kort.olivant.fo

*KIRKJUBØAR KOMMUNA*

# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða á stovu við 2-5 ára gomlum børnum.
Nær: At byrja 1. august (ella eftir avtalu)
Arbeiðstíð: 35 tímar um vikuna (ella eftir avtalu)
Løn og arbeiðsviðurskifti eftir sáttmálanum hjá Føroya Pedagogfelag.

**Í Barnagarðinum á Velbastað** eru 40 børn millum ½ og 9 ár.
Tey eru í 3 aldursbýttum stovum: 0-2 ár, 2-5 ár og 5-9 ár.

Barnagarðurin er í friðarligum umhvørvi, næstan í haganum. Børnini eru úr Kirkjubø, av Velbastað og úr Havn. Tað tekur eitt korter at koyra úr Havn, og eisini ber til at koyra við bygdaleiðum.

Vit vænta, at tann, sum verður sett/ur í starv
- dámar væl at vera úti í náttúruni
- sær uppgávur sum avbjóðingar og ikki sum trupulleikar
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- vil vera við til at seta sín dám á stovnin

Umsókn við prógvi og møguligum viðmælum skal vera barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 30. juni. Um eingin pedagogur verður settur í starv, hava vit hjálparfólk.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Barnagarðin á tlf. **31 81 21** og spyrja eftir leiðaranum.

**Barnagarðurin á Velbastað**
FO-176 Velbastað
velbarn@post.olivant.fo

gult33 cyan33 magenta33 svart33



# Frítíðarskúlin í Sunda Kommunu

Søkt verður eftir 1 pedagogi 30 tímar viku og 1 hjálparfólki 30 tímar viku, at byrja 13. august.

Skipanin við frítíðarskúla í Sunda Kommunu er nýggj og er ein partur av Dagstovninumá Oyri.

Frítíðarskúlin fer at halda til í skúlanum og letur upp fyrstu ferð, tá skúlin byrjar aftur 20. august.

**Vit ynskja at umsøkjararnir:**
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt,
- kunnu samstarva við dagstovnin, skúlan og foreldur,
- dáma væl at vera úti í náttúruni saman við børnunum,
- kunnu skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.

Størvini verða fyribils lønt sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Rosu Prestá, ella varaleiðaran Sólrún Dam, á tlf. 422552.

**Dagstovnurin á Oyri**
450 Oyri
tlf. 422552 - fax 422632

# Marknaðarstarv í Føroya Skúlabókagrunni

Eitt starv í Føroya Skúlabókagrunni verður lýst til setanar frá 1. august 2001.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um marknaðarføring av undirvísingarmiðlum til skúlaverkið og tað arbeiðið, sum av tí stendst. Umframt kann vera annað arbeiði, eftir tørvi.

Starvsfólkið skal røkja bóka- og undirvísingarmiðlasamskifti við skúlar, við avvarðandi skúlamyndugleikar, við bókasølurnar o.o. og skal millum annað taka sær av at lýsa undirvísingarmiðlar í fjølmiðlum, á Interneti og aðrastaðni.

Til starvið krevst hollur kunnleiki til undirvísingarmiðlar, áhugi og hegni til marknaðarføring, eins og fíggjarligt innlit og góður teldukunnleiki hava stóran týdning.

Løn og setanartreytir verða at avtala eftir tí førleika, umsøkjarin hevur.

Royndartíðin er 1 ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera skúlabókanevndini í hendi í seinasta lagi 4. juni 2001.

Gjøllari upplýsingar um starvið fáast frá skrivaranum í skúlabókanevndini, telefon 31 61 00.

Tórshavn, 14. mai 2001

**Føroya Skúlabókagrunnur**
**Skúlabókanevndin**
Lützenstrøð 4 · FO-100 Tórshavn
Telefon 316100

## Mentamálastýrið

# Stjóri til Sjónvarp Føroya

***Starvið:***
Eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum stjóri í Sjónvarpi Føroya er leyst at søkja.

Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir Mentamálastýrinum.

Høvuðsuppgávurnar hjá Sjónvarpi Føroya eru m.a.:
- Mótvegis borgarunum at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald
- Í programmvirkseminum at leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi og sakliga og óhefta upplýsing
- At veita eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga

Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av stovninum. Stjórin setir starvsfólk og loysir fólk úr starvi, og stjórin hevur fyristinginarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum mótvegis landsstýrismanninum.

Sjónvarp Føroya og alt fjølmiðlaøkið stendur yvir fyri stórum broytingum og avbjóðingum, og tí er umráðandi, at stjórin megnar at fáa stovnin at ríða á aldukambinum.

***Førleikakrøv***
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava
- Útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Evni at sameina tað mennandi og tað fíggjarliga
- Kunnleika til føroyska mentan og føroyskt mentanarlív
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt menn-andi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við aðrar stovnar o.o.
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum
- Evni at menna SvF til ein týðandi mentanarstovn

***Vit bjóða:***
Sjónvarp Føroya mennist alsamt, og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti og samstarvi inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarvi.

Arbeiðið er á høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

***Setanar- og lønartreytir***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki hjá Tænastumannafelagi Landsins, tó uttan at vera eitt tænstumannastarv. Harumframt verður veitt eitt eftirlønargjald uppá 15%. Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti sum partarnir samráðast um. Tann setti skal kunna góðtaka broytingar í starvinum orsakað av møguligum komandi bygnaðarbroytingum.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
tlf. 35 50 50, faks 35 50 55, t-postur: mms@mms.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. juni 2001. Starvið verður sett frá 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra, ella Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra í Mentamálastýrinum, á tlf. 35 50 50.

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Sjónvarp Føroya** er, sum nú er, býtt uppí 5 deildir. Í Sjónvarpi Føroya starvast 50 fólk. Rakstrarætlan Sjónvarpsins er uml. 23,5 mió. kr. fýri fíggjarárið 2001.*

# Sølubúðin á Vaglinum

Sølubúðin á Vaglinum hevur opið aftur frá mikudegnum 6. juni.

Opið er soleiðis:

| | |
|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | kl. 10.00–17.30 |
| Leygardag | kl. 10.00–14.00 |

**Sjálvsognarstovnurin ALV**

# *Nú er nokk!!!*

*Ert tú troytt/-ur av íbúðarviðurskiftunum í Havn?*
*Troytt/-ur av ongantíð at vita, um tú knappliga ert heimleys/-ur?*
*Hug at gera nakað við hesi viðurskifti?*

**ring 252711**